## Vónleys støða viðvíkjandi barnaansing

Umsitingin í Vinnuhúsinum hevur tosað við fleiri virkir sum siga, at ein av størstu størstu forðingunum fyri at fólk flyta heimaftur, er vónleysa støðan viðvíkjandi barnaansing, serliga í Tórshavn

Gongd er av álvara komin aftur í føroyska samfelagið, og innan vinnuna eru fleiri virkir sum merkja fløskuhálsar viðvíkjandi arbeiðsmegi, skrivar Vinnuhúsið.

Handverksvinnan manglar fólk, partvís tí at fleiri handverkarar enn eru uttanlanda. Ein annar stórur trupuleiki sínist at vera ov lítið av teldukønum fólki. Bæði teldufyritøkurnar og onnur virkir, sum tørva teldukøna arbeiðsmegi, mangla fólk. Eisini innan onnur øki sær tað út til at vera trupult at fáa væl útbúgvna arbeiðsmegi.

Fitt av vælútbúgvnum føroyingum eru uttanlands, t.d. fólk við útbúgvingum innan kunningartøkni. Tað vísir seg hinvegin at vera trupult at fáa fólk heimaftur.

Virkini klaga
Umsitingin í Vinnuhúsinum hevur tosað við fleiri virkir sum siga, at ein av størstu størstu forðingunum fyri at umrøddu fólk vilja flyta heimaftur, er vónleysa støðan viðvíkjandi barnaansing, serliga í Tórshavn.

Trupuleikarnir av væntandi barnaansing merkjast ikki bara, tá talan er um at fáa útbúgvi fólk at flyta heimaftur. Alt slag av virkjum – fiskavirkir, handlar o.o. - klaga um henda trupulleika.

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur tí at tað er neyðugt, at bæði lands- og komunalpolitikarar taka henda trupuleika í álvara, verður sagt í tíðindaskrivinum frá Vinnuhúsinum.

Lesið eisini Sosialin á Internetinum

www.sosialurin.fo

Mammudagur
á Hotel Föroyum
frá kl. 12.00

Børn undir12 ár 1/2 prís

Til Matna
❇ Aspargessúpan
við heimabakaðum breyði
❇ Lambssteik
við grønmeti, sós og eplum
❇ Íscocktail

Kostnaður kr. 175,-
Borð kann bíleggjast á tel. 317500

Altíð vælkomin á Hotel Föroyar Tel. 317500 Best Western

Sosialurin - 311820

# Neyðugt at fáa leiðslubygnaðin á deildunum at virka

*Ein framskriving av játtanini til Landssjúkrahúsið vísir eitt hall uppá 2,5 mió. kr. upp á ársbasis. Tiltøk eru tó sett í verk og metast má, at játtanin fer at halda, sigur Helena Dam á Neystabø m.a. í svari til fyrispurning*

ÓLAVUR Í BEITI

Kristian Magnussen, løgtingsmaður, spurdi almanna- og heilsumálaráðharran, Helenu Dam á Neystabø um eina meting av samlaðu nýtsluni viðvíkjandi almanna og heilsumálum, og um játtanin fór at halda. Og um landsstýrismaðurin ikki metir, at játtanir koma at halda, hvørji stig ætlar hann so at taka fyri at tryggja, at hesar halda? spyr Kristian Magnussen.

**Landssjúkrahúsið**
Í svarinum nevnir Helena Dam á Neystabø nakrar konti, har iva er um, um játtaninar koma at halda, uttan at neyðug tiltøk verða sett í verk.

– Ein framskriving av játtanini til Landssjúkrahúsið vísir eitt hall uppá 2,5 mió. kr. upp á ársbasis. Tiltøk eru tó sett í verk og metast má, at játtanin fer at halda. Tað er tó ikki innan fyri verandi játtan pláss til at seta tær nýggju deildarleiðslurnar á stovn á Landssjúkrahúsinum. Skulu hesar setast á stovn í ár, verður neyðugt at søkja um eykajáttan til endamálið.

– Neyðugt er at fáa leiðslubygnaðin á deildunum at virka sum skjótast, og fer tí at gera eina roynd at útvega neyðuga peningin til endamálið, umleið eina hálva millión krónur til tað, sum restar í av hesum árinum, sigur Helena Dam á Neystabø.

**Hotel Tórshavn**
Viðvíkjandi »Serviðgerð uttanlands«, sigur Helena Dam á neystabø, at henda konti er sera trupul at gera upp, tí tað ikki er landsstýrismaðurin, sum hevur heimildina til at áseta nýtsluna, men tann einstaki yvirlæknin, sum sambært sjúkrahúslógini hevur rætt til at senda sjúklingar uttanlands. Landsstýrismaðurin fer at halda neyvt eyga við hesi konto og um neyðugt biðja um eykajáttan.

– Ein fyribils uppgerð frá Hotel Tórshavn vísir ein stóran vøkstur í seingjanýtsluni fyrsta ársfjórðing ár 2000 í mun til fyrsta ársfjórðing 1999. Í fyrsta ársfjórðingi 2000 eru 4.497 seingjardagar nýttir, meðan sama tal fyri 1999 var 3.072 seingjardagar. Orsøkin til henda stóra vøkstur verður mett at vera, at tey, sum fyrr búðu aðrastaðni enn á Hotel Tórshavn, nú, tá ið hotellið er gjørt betri, eru flutt inn her. Heldur gongdin áfram, fer meira at verða brúkt til Hotel Tórshavn enn ætlað, sigur almanna- og heilsumálaráðharrin.

**Dagstovnar**
Vivíkjandi hesi konti, sigur Helena Dam á Neystabø, at um verandi virksemið um alt landið heldur fram eins og nú, koma at mangla um 7 mió. kr. í á hesi høvuðskonto.

– Greitt er frá hesum í teimum lógaruppskotum sum liggja til viðgerðar í tinginum um avtøku av lógini um býtið av almannaútreiðslunum eins og í lógaruppskotinum um dagstovnar. Eftir tí, sum skrivað er í fíggjarlógini, er hædd ikki tikin fyri teimum broytingum sum hendu 1. januar ár 2000 og sum koma at henda, tá ið lógin um býtið av almannaútreiðslunum verður tikin av og lógin um dagstovnar kemur í gildi.

– Verða lógirnar ikki settar í gildi fyrr enn 1. juli ár 2000, verður tørvurin umleið 3 milliónir krónur størri, sigur Helena Dam á Neystabø.

# Ikki felags ríkisborgararætt

*Í útgangsstøðinum verður føroyskur ríkisborgararættur skipaður, tá Føroyar gerast fullveldi, sigur sjálvstýrismálaráðharrin í svari til fyrispurning*

ÓLAVUR Í BEITI

Heðin Mortensen, løgtingsmaður, setti Høgna Hoydal tveir spurningar, har tann fyrri er um ríkisborgararættin hjá føroyingum, um so verður, at Føroyar gerast fullveldi, og hin er um, hvat ítøkiligt landsstýrið ætlar at gera, fyri at føroyskir sjómenn ikki skulu missa rættindini til at sigla sum skiparar í danska handilsflotanum, um føroyingar missa danska ríkisborgararættin?

**Eingin rættarvenja**
Í svarinum til fyrra spurningin, sigur Høgni Hoydal, at í útgangsstøðinum verður føroyskur ríkisborgararættur skipaður, tá Føroyar gerast fullveldi.

– Ongin sjálvsøgd rættarvenja er tó fyri, hvussu ríkisborgaraspurningurin meira neyvt verður skipaður, tá lond fáa fullveldi. Tí hevur tað ógvuliga lítla meining at siga nakað meira neyvt um, hvussu viðurskiftini vera á júst hesum økinum, ella á onkrum øðrum øki.

– Málið hjá samgongu og landsstýri hevur ikki verið at fáa felags ríkisborgararætt, men at vit skulu hava sínámillum javnbjóðis rættindi í tjóðskapi á flestøllum økjum, eisini hesum. Undir samráðingunum annan mai, vísti danska stjórnin til norðurlendsku sáttmálarnar, men segði seg sinnaða at finna loysnir sum ganga longur, á ávísum økjum, m. a. á hesum økinum, svarar Høgni Hoydal.

**Eingin broyting**
Viðvíkjandi seinna spurninginum, sigur sjálvstýrismálaráðharrin, at gongst sum landsstýrið ætlar, verður ikki nøkur broyting í hesum rættindum, tí hetta verður fevnt av ásetingini um javnbjóðis rættindi í tjóðskapi.

– Tá ið samráðingarnar millum landsstýrið og donsku stjórnina eru komnar longur áleiðis, verður sjálvsagt greitt, hvussu hesi viðurskifti kunnu skipast, og landsstýrið ynskir, at føroyskir sjómenn skulu hava trygg viðurskifti at útinna sítt starv. Tá eitt sáttmálauppskot er liðugt og góðkent millum partarnar, verður gjørligt hjá løgtinginum og øllum veljarum at taka støðu til úrslitið, sigur Høgni Hoydal m.a. í svari sínum til Heðin Mortensen.

# Ávís tilvild ræður í umsitingini av fiskivinnuni

Tørvur kundi verið á at orða ein yvirskipaðan politikk fyri fiskivinnuna, ið skapar greiðar karmar bæði á sjógvi og landi, heldur Arbeiðsgevarafelagið

Í seinasta tíðindabrævi frá Vinnuhúsinum verður sagt, at Vinnumálastýrið hevur orðað yvirskipaða politikkin sum stýrt verður eftir innan vinnugreinir sum t.d. havbúnaðin.

Hetta ger tað nógv einfaldari hjá vinnuni, og karmarnir eru kendir og støðugir. Eisini merkir hetta, at polittikarar og umsiting ikki uttan víðari kunnu bróta við tær meginreglur, ið settar eru, og sum vinnan hevur góðkent.

Nú oljuvinnan er við at taka seg upp, er eitt stórt arbeiði gjørt við at leggja greiðar karmar um hesa nýggju vinnu.

**Yvirskipaðan politikk**
Fiskivinnan er og verður okkara høvuðsvinna. Tí heldur Arbeiðsgevarafelagið, at tørvur kundi verið á at orða ein yvirskipaðan politik fyri fiskivinnuna, ið skapar greiðar karmar bæði á sjógvi og landi.

Nógvar ábendingar hava verið um, at ávís tilvild ræður innan umsitingina av fiskivinnuni, t.d. viðvíkjandi útskriving av fiskiloyvum. Áhugavert er at samanbera loyvispolitikkin í komandi oljuvinnuni, við tær kendu vinnurnar sum troyta náttúruríkidømi okkara.

Fyri at fáa eitt loyvi til leiting eftir olju, skulu virkir prógva dugnaskap, royndir og sínar ætlanir. Ilt er at síggja, at hugt verður eftir slíkum innan fiskivinnuna.





*Líka víst summartekin sum flytifuglurin eru tey stóru, fremmandu ferðamannaskipini, sum vitja okkum á hvørjum sumri*

# Nú byrjar summarið

*Summarið byrjar av álvara, tá fremmandu ferðamannaskipini koma, og Norrøna er farin undir sína summarsigling. Norrøna kemur fyrsta túrin í summarsiglingini mánamorgunin, og á hvítusunnu kemur tað fyrsta fremmanda ferðamannaskipið*

EDVARD JOENSEN

Mánadagin byrjar summarsiglingin hjá Norrønu. Tá kemur hon fyrsta túrin úr Hanstholm. Við verða umleið 300 ferðafólk og 72 bilar.

Áki Jespersen á Smyril Line sigur, at ferðafólkatalið í ár teknar til at blíva á leið tað, sum var í fjør. Í fjør flutti Norrøna 72.000 ferðafólk og 18. 200 bilar millum londini.

Siglingin byrjar heldur fyrr nú, enn hon plagdi fyrr. Í fjør varð summarsiglingin víðkað við tveimum vikum, sigur Áki Jespersen. Í ár er hon flutt eina viku orsakað av, at Norrøna skal í dokk í heyst. Siglingin byrjar, sum sagt, komandi vikuskifti og endar tann 9. september.

Tá fer Norrøna í dokk í ein mánað, áðrenn hon fer aftur í vetrarsigling við farmi.

Meðan Norrøna er í summarsigling, hevur Smyril Line leigað eitt farmaskip at sigla ta rutuna, sum Norrøna røkir um veturin. Hetta skipið eitur Tango og er størri og skjótari enn Clair, sum røkti hesa rutuna í fjør.

Ferðamynstrið er tað sama, sum tað plagar at vera við Norrønu. Føroyingar og týskarar eiga stóra partin av ferðafólkunum. Áki Jespersen sigur, at tað sær út til, at danirnir fækka eitt sindur í ár, men einki merkisvert kortini, heldur hann. Hinvegin væntar hann fleiri føroyingar. Og teir eru ofta heldur seinni at bíleggja enn onnur, so tað kann koma okkurt aftrat enn.

Herfyri fóru flogfeløgini at kappast um ferðafólkið við bíligum ferðaseðlum á ávísum túrum. Hetta hevur ikki ávirkað ferðafólkatalið við Norrønu, sigur Áki Jespersen.

Men greitt er, at ferðafólkatalið loftvegis er økt mundandi í seinastuni. Í apríl ferðaðust 21,1% fleiri ferðafólk um flogvøllin í Vágum, enn í apríl í fjør. Hesin vøksturin stendst tó ikki av tilboðunum frá Maersk Air og Atlantsflog, tí tey komu ikki í gildi fyrr enn tann 28. apríl. Men á flogvøllinum í Vágum vænta tey at fara at síggja hesi tilboðini aftur í ferðafólkatalinum komandi mánaðarnar.

Hinvegin verður flogið fleiri túrar um vikuna í ár, enn gjørt varð í fjør. Páskirnar fullu í apríl í ár. Handilsstevnan Tórrek var eisini, og tá vórðu gjørdir fleiri eykatúrar millum Ísland og Vágar. Og slíkt telur alt við, siga tey á flogvøllinum.

Eitt annað víst summartekin eru tey stóru, fremmandu ferðamannaskipini, sum koma á styttri vitjanir. Vanliga eru tey her nakrar tímar, meðan ferðafólkini gera útferðir í landinum.

Hetta tykist vera nakað, sum vindur upp á seg, sigur Mia Cameron á havnarskrivstovuni í Havn.
Í ár eru 29 av hesum skipunum fráboðað, og tað er met. Eisini væntar Mia Cameron, at ferðafólkatalið verður tað hægsta nakrantíð. Í fjør vitjaðu knappliga 9.000 fólk hendan vegin við hesum skipunum. Í ár vænta tey, at talið fer at nærkast teimum 12.000 ferðafólkunum.

Tað eru fleiri gamlir kenningar millum teirra, sum hava boðað frá vitjan í summar, sigur Mia Cameron. Men eisini skip, sum ikki hava verið fyrr, eru á listanum.

Eitt nýtt fyribrigdi í hesum sambandi tykist vera, at alt fleiri av hesum skipunum seta fólk út í smáum gummibátum, sum gera ferðir undir bjørgini. Til dømis skal fyrsta skipið, sum kemur hendanvegin í summar, til Mykinesar og Vestmanna. Hetta skipið var eisini her í fjør, og tá sigldu tey millum annað inn á Hólmgjógv í Mykinesi. Og slíkar túrar ætla tey at gera aftur í summar, skilst.

# Føroyingar fara suðureftir

*Føroyingar ferðast dúgliga til heitaru londini at halda summarfrí. Faroe Travel í Havn var tann seljarin, sum samanlagt seldi næstflestar charterferðir fyri kenda donska ferðamannafelagið Tjæreborg í apríl*

Av ferðaskrivstovuni Faroe Travel í Havn verður sagt, at tey hava úr at gera við at selja ferðaseðlar. Nógv tann størsti parturin er millum Vágar og Kastrup, sigur Erland Rasmussen á Faroe Travel.

Ein partur kemst av teimum bíligu ferðaseðlunum, sum flogfeløgini hava at bjóða júst nú. Og á Faroe Travel hava tey merkt eina veruliga framgongd, síðan hesi tilboðini komu. Men hesi tilboðini eru bara galdandi fram til 19. juni, og eisini uttan fyri skeiðið, hesi tilboðini eru galdandi, verður væl selt.

Eisini eru teir lesandi føroyingarnir utanlands millum teirra, sum fylla væl í hagtølunum hesa ársins tíð.

Erland Rasmussen sigur, at serliga eru tað charterferðirnar suður eftir, sum ganga væl í ár. Faroe Travel var í apríl næststørsti seljarin hjá kenda danska felagnum Tjæreborg. Og her tosa vit um talið á ferðafólkum og ikki í prosentum av fólkatali í økinum, har søluskrivstovan liggur, sigur Erland Rasmussen.

HEIMA BIO




Fight Club



Teaching Mrs. Tringle

VIDEOTOP 10

VIKA 19

1 Generalens datter
2 End of Days
3 Deep Blue Sea
4 She's All That
5 Star Wars Den usynlige fjende
6 Sex Games
7 The Blair Witch Project
8 I Kina spiser de hunde
9 Runaway Bride
10 Arlington Road

Í Gundadali tel. 31 47 70
Í Kollafirði tel. 42 10 83
Í Saltangará tel. 44 91 33
Í Klaksvík tel. 45 73 53
Í Sørvági tel. 33 20 01
Í Leirvík tel. 44 33 60
Í Skálafirði tel. 44 12 00

STATOIL
støðirnar kring landið

petur & petur 320870